# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Public service sáttmálin á tingborð

Leingi hevur verið bíðað eftir public service sáttmálanum, sum loksins er komin á tingborð. Viðgerðin er avgerandi fyri almenna fjølmiðlapolitikkin. Public service-hugtakið verður nýtt um allan heimin. Sum heild kan verða sagt, at public service hugtakið hevur nakað at gera við, at flestu fólkaræði hava eina ella fleiri almennar kringvarpsrásir, ið so ella so eru alment figgjaðar og tískil hava ávísar skyldur mótvegis almenninginum.

Landsstýriskvinnan leggur dent á, at Kringvarpið virkar í fólksins tænastu ella skal tæna borgarunum, ið rinda kringvarpsgjald afturfyri. Samstundis, sum vit eru samd í hesum, loyva vit okkum at seta spurnartekin við, um KVF hevur livað upp til hesar meginreglur til hendan dag. Vit hugsa um virksemið hjá almenna kringvarpinum eftir, at føroyska kringvarpslóggávan varð liberaliserað. Endamálið við liberaliseringini var at geva rúm og møguleikar fyri privatum útvarps- og sjónvarpsrásum. Sambært tingmálinum fer kringvarpsgjaldið í 2010 at geva KVF 46 milliónir og lýsingarinntøkurnar fara at geva umleið 11 milliónir. Sostatt er tað ein spurningur í hvønn mun tað hevur eydnast løgtingi og landsstýri at liberalisera føroyska kringvarpsøkið, tá samstundis verður hugsað um, at almenni og alment fíggjaði stovnurin í Sortudýki rekur kappingaravlagandi virksemi á føroyska lýsingarmarknaðinum.

Tað skal ásannast, at sáttmálauppskotið hevur jalig tekin á hesum øki, tí gjørt verður vart við, at lýsingarparturin hjá útvarpinum eigur at niðurlagast soleiðis, sum løgtingið áður hevur ásett í málinum um nýggja kringvarpslóg. Hetta er stig rætta vegin. Tá hetta er sagt skulu vit sjálvsagt enn sum áður ásanna, at KVF er ein hin týdningarmesti mentanarstovnur í landinum, og vit unna sjálvsagt hesum stovni tær bestu umstøður. Vit eru eisini samd við mentamálaráðharran um, at PS-hugtakið er so breitt, at tað er trupult at røkja allar hugsandi skyldur í senn. Tað var tí skilagott av táverandi mentamálaráðharra, Jógvan á Lakjuni, at seta public service sáttmálamøguleikan í lógina. Við slíkum sáttmála kann landsstýrismaðurin í samráð við KVF raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar PS-skyldur í einum tíðaravmarkaðum sáttmála, og hetta kann verða gjørt í samráð við løgtingið, sum umboðar alt Føroya fólk. Á hendan hátt kunnu vit fáa tað almenna orðaskiftið um leiklut kringvarpsins í samfelagnum, sum okkum øllum tørvar.

Her kann frá almennari síðu verða givið eitt klárt signal til KVF um, hvat almenningurin eigur at fáa fyri tann pening, sum hvørt einasta húski í Føroyum hevur skyldu til at rinda stovninum. Sáttmálin er eisini ein áminning til KVF um, at tey, sum har starvast, veruliga eru fólksins tænarar og slík áminning kann vera neyðug til almennar stovnar sum heild og kanska serstakliga til KVF. Samantikið eitt áhugavert og tiltrongt tingmál, og vit ynskja sjálvsagt, at endaliga úrslitið fer at verða til gangs fyri føroyska mentan og tíðindaflutning og harvið fyri alt Føroya fólk, sum eigur KVF.

**Sosialurin**

## Sjúkrakassarnir – fyri limirnar ella nevndarlimirnar?

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Ávíst kjak hevur tikið seg upp um, hvat skal vera av pengunum, sum sjúkrakassarnir hava tikið ov nógv frá okkum limunum.

Heilsumálaráðharrin vil hava pengarnar yvir í nýggju Heilsutrygdina, har teir skulu nýtast til m.a. granskingarendamál, meðan nevndarlimirnir í verandi sjúkrakassum vilja hava teir at spæla sær við til nýggja sjúkratrygging, ið teir ætla at seta á stovn.

Eg má siga, at eg eri fullkomuliga samdur við Akseli Johannesen, heilsumálaráðharra. Hasir pengarnir eru kanska ikki ogn hjá limunum í skjótt fyrrverandi sjúkrakassunum sambært viðtøkunum, men teir eru so sanniliga ikki ogn hjá núverandi nevndarlimum í sjúkrakassunum.

Tað einasta anstendiga, ið núverandi nevdnarlimir í sjúkrakassunum kunnu gera, er at taka undir við heilsumálaráðharranum og nýta pengarnar til okkurt skilagott, og har kemur gransking ovarlaga á listan.

Vit kunnu hugsa um tvey granskingarendamál, ið eiga at liggja okkum sera nær. Annað er gransking í sonevndu "føroysku" sjúkuni og hitt er CTD. Í báðum førum er talan um sjúkur, ið upptaka okkum føroyingar sera nógv, so hasar 40 milliónirnar koma óiva sera væl við hjá granskarum, ið hava hug at granska meira í hesum sjúkunum, og vónandi finna fram til okkurt, sum vil hjálpa okkum í framhaldandi fyribyrging av hesum álvarsomu sjúkum.

Velur nevndin í sjúkrakassunum ikki at nýta pengarnar til gransking innan Heilsutrygd, so kemur spurningurin, hvat pengarnir so skulu nýtast til.

Fyri útvið 20 árum síðani, tá kreppa herjaði oyggjarnar og fleiri valdu frá at nýta avmarkaðu peningarnar til at gjalda sjúkrakassa við, var lógin um gjald til sjúkrakassarnar broytt soleiðis, at sjúkrakassarnir altíð fingu sínar pengar.

Um limirnir ikki betaltu til tíðina, so fóru sjúkrakassarnir bara til Gjaldstovuna, sum rindaði fyri limirnar, og so aftur fór til kommununa, har limurin búði, og trekti hana fyri gjaldið. Síðani kravdu myndugleikarnir pengarnar inn gjøgnum skattamyndugleikarnar og avroknaðu aftur til kommunurnar, sum høvdu lagt út fyri sínar borgarar, ið ikki høvdu goldið sjúkrakassagjald.

Men hendan innkrevjing er ongantíð 100% effektiv, so kommunurnar hava gjøgnum tíðina lagt nógvan pening út til sjúkrakassarnar, sum tær ikki hava fingið inn aftur. Tá sjúkrakassarnir nú hava 40 mió í avlopi, so kundu teir kanska hugsa um at endurrinda kommununum hendan peningin, tí tað kann ikki vera meiningin, at kommunurnar gjalda pening í ein grunn, sum síðani verður nýttur til eina privata sjúkratrygging! Tað er ikki ætlanin við kommunuskattinum!

At sjúkrakassarnir nú hava 40 mió í avlopi vísir bara, at teir hava tikið meira pening frá limunum, enn neyðugt var. Væl veit eg, at teir ikki hava kunna tikið so lítið inn, at pengar ikki vóru til at gjalda rokningarnar, men upphæddin teir nú hava, er meira enn 1.000 kr fyri hvønn lim, og tað kann tykjast at vera í meira lagi, nú brúk ikki verður fyri sjúkrakassunum longur.

Onkur vildi um dagarnar vera við, at sjúkrakassarnir bevíst hava samla pening inn seinastu tíðina, tí teir vistu, at tíðin hjá teimum var um at renna út og teir í staðin vildu stovna sína egnu sjúkratrygging. Eg kann ikki trúgva, at hetta kann vera rætt, men um nakað sum helst er um tað, so hava sjúkrakassarnir ein alvorligan trupulleika!

Hvat skulu vit annars við einari privatari sjúkratrygging? Er tørvur á einari slíkari, so hava vit í forvegin tryggingarfeløg, ið kunnu taka hendan táttin upp. Trygd hevði hendan tankan frammi fyri nøkrum árum síðani, men har kom onki burturúr. Hví? Helst tí onki grundarlag var fyri hesari trygging, og hví skuldi tað so verið brúk fyri slíkum nú?

Um tað eydnast í Danmark at hava eina privata sjúkratrygging, er ikki tað sama sum at tað eisini eydnast í Føroyum. Danskarar eru meira enn 100 ferðir fleiri í tali enn vit, so eg vænti, at ein privat føroysk sjúkratrygging bert fer til umsiting, um ikki gjaldið skal vera so høgt, at fáur hevur ráð at vera limur har.

Tey, ið tekna privatar sjúkratryggingar eru ofta tey, ið vilja leypa køir um í almenna sjúkrahúsverkinum við at lata seg viðgera á privatum hospitalum. Hetta eru kostnaðarmiklar viðgerðir, so givið er, at gjaldið til slíkar tryggingar er høgt, eins og talið av tryggingartakarum eisini má vera høgt fyri at bera útgjøldini, umframt at slík trygging helst eisini skal hava yvirskot fyri at økja um gjaldsevnini.

At hugsa sær, at 50.000 føroyingar, har meginparturin ikki kemur at hava ráð at tekna slíkar tryggingar, skulu kunna vera grundarlag undir einum slíkum tryggingarfelag, liggur uttanfyri tað, ið eg kann síggja fyri mær, og tí meti eg tað vera eitt ørðvitisprojekt, ið tit eiga at jarða beinanvegin!

Eg eri eisini samdur við heilsumálaráðharranum, at sjúkrakassagjaldið seinastu næstan 20 árini hevur verið álíkt einum skatti og tí ikki er peningur, sum nevndirnar í núverandi sjúkrakassunum kunnu skalta og valta við, sum teimum lystir.

Vónandi koma nevndirnar í sjúkrakassunum til fornuft og lata pengarnar til alment gangnligt endamál og ikki til teirra privata spæl! Um tit ikki megna tað, burdu tit um ikki annað spurt okkum limirnar, um hvat vit halda. Eg haldi ikki, at nakrir meira ella minni tilvildarliga valdir nevndarlimir í sjúkrakassunum eiga at hava slíkt vald at misbrúka ov nógv innkravda limagjaldið.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.